ÍTRÓTTARBLAÐIÐ
Sosialurin 19. januar 2010

# Hálvfinalan í annaðkvøld

**Í annaðkvøld klokkan 19 møtast kvinnuliðini hjá Drátti og Fleyr hálvfinalu í steypakappingini í ítróttarhøllini á Eiði. Liðini hava vunnið hvør sína av smærru steypakappingunum, og nú stendur eitt pláss í stóru steypafinaluni 20. februar upp á spæl**

einslistir@kallnet.fo

Hilmar Jan Hansen



Tá Dráttur og Fleyr sunnudagin spældu finaluna í Føroya Banka-kappingini, hevði Dráttur munin, men í annaðkvøld møtast liðini aftur, og tá kemur vinnarin í steypafinaluna hjá kvinnunum, har mótstøðuliðið verður SÍ
Mynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir

Tá Dráttur sunnudagin vann 3-1 á Fleyr í finaluni í Føroya Banka-kappingini, sum Mjølnir var vertur fyri, merkti tað samstundis, at neyðugt verður við hálvfinalu, áðrenn sigast kann, hvør skal í steypafinaluna hjá kvinnum at spæla ímóti SÍ, sum longu fyri tveimum mánaðum síðani tryggjaði sær annað finaluplássið, tí liðið var á odda í landskappingin eftir fyrsta spælda triðingin.

Fleyr hevði annars komið beinleiðis í steypafinaluna, um tað hevði verið Fleyr, sum vann sunnudagin, tí Fleyr tíðliga í heyst vann FK-kappingina. Men av tí at Fleyr tapti, eru Fleyr og Dráttur púra javntstillað, áðrenn altavgerandi hálvfinalan í steypakappingini hjá kvinnum í annaðkvøld klokkan 19 verður spæld í ítróttarhøllini á Eiði.

Í finaludystinum sunnudagin hevði Dráttur munin tað mesta av dystinum og vann fult uppiborið. Í fyrsta setti, sum Fleyr vann, var tað Dráttur, ið førdi meginpartin av tíðini. Næstu tvey settini vóru rættiliga jøvn, meðan Dráttur trygt streyk avstað við triðja setti og sigrinum.

### Fleyr havt munin

Undan finaluni í Føroya Banka-kappingini, sum varð spæld í Badmintonhøllini í Klaksvík, var Fleyr av teimum flestu roknað sum favorittur, men tað helt bara ikki, tá dysturin fór í gongd. Nú fæst so at síggja, um øðrvísi verður í annaðkvøld.

Tvær ferðir hava liðini spælt ímóti hvørjumøðrum í Eik-liguni í vetur, og báðar ferðir hevur Fleyr vunnið. Fyrru ferðina máttu fimm sett til, áðrenn Fleyr á heimavølli fekk sín 3-2 sigur til høldar, og seinnu ferðina vann Fleyr ein rímiliga tryggan 3-1 sigur.

Í Eik-liguni er Fleyr í løtuni nummar fýra við 12 stigum fyri 10 dystir, meðan Dráttur er á fimta plássi við 10 stigum fyri 11 dystir. Her hevur Fleyr sostatt munin í løtuni, men henda støða hevur bara einki at siga, nú ein altavgerandi hálvfinala skal spælast. Tá snýr tað seg snøgt sagt um, hvat av liðunum er betri her og nú.

Eydnast tað Drátti at fara allan vegin og vinna, verður Vágoyggin betur umboðað í steypafinalunum enn nakrantíð, tí frammanundan er greitt, at SÍ hevur spælt seg í steypafinaluna hjá bæði kvinnum

# B68 og TB banka uppá

**Hóast hvørki toftakvinnur ella tvøramenn endaðu millum tey bestu í Føroya Banka-kappingini um vikuskiftið, vístu tey bæði 1. deildarliðini góðar taktir, nú tey sluppu at kappast við tey, sum spæla eina deild hægri**

einslistir@kallnet.fo

Hilmar Jan Hansen

Sum tað onkuntíð hevur verið seinnu árini, vóru tvey 1. deildarlið »flutt upp«, nú onnur av smærru steypakappingunum var um vikuskiftið. B68, sum er á odda í 1. deild hjá kvinnum, og TB, sum er við í oddanum í 1. deild hjá monnum, spældu ímóti liðunum í Eik-liguni í Føroya Banka-kappingini, sum Mjølnir skipaði fyri.

Hóast tað helst er ein stórur biti at spæla fleiri dystir á rað ímóti liðum, ið mugu metast at vera væl betur fyri, stóðu bæði B68 og TB seg so mikið væl, at tað ikki er ilt at síggja fyri sær, at tey skjótt kunnu vera at síggja í Eik-liguni.

B68 tapti teir báðar fyrstu dystirnar 0-2. Í tí fyrra, sum var ímóti TB, var talan um reinan avsmurning, men í næsta dystinum, sum var ímóti Fleyr, ið seinni kom í finaluna, kom B68 upp á 15 í fyrra settinum og 20 í seinna. Í triðja dystinum spældi B68 ímóti KÍF, sum er botnlið í Eik-liguni, og tá bragdaði hjá toftakvinnum, sum vunnu greiðan 2-0 sigur við settúrslitunum 25-9 og 25-13.

Heldur støðan sær í báðum deildum, sum hon sær út nú, verða tað júst B68 og KÍF, ið skulu spæla ímóti hvørjum øðrum um upp- og niðurflyting, tá landskappingin annars er av. KÍF hevur einki stig í Eik-liguni og er fýra stig aftan fyri næstaftasta liðið, sum er ÍF, meðan B68 í 1. deild er fýra stig framman fyri nummar tvey eftir sjey umfør.

### TB er væl á veg

Menninir hjá TB eru í síni landskapping á triðja plássi, tvey stig aftan fyri nummar eitt, men vóru annars einsamalt oddalið í 1. deild fleiri tey fyrstu umførini. Nú teir sluppu at royna seg ímóti liðunum í Eik-liguni, stóðu teir seg heilt væl, hóast tað ikki eydnaðist teimum at vinna nakað sett og tiansheldur nakran dyst.

Talan var tó um framgongd í hvørjum dysti, og tað tóktist, sum arbeiddu teir við at venja seg við hægri ferð á spælinum og størri mótstøðu, enn teir annars eru vanir við. Serliga vístu teir hjá TB dygdir í seinasta dystinum, sum var ímóti ÍF, ið er niðast í Eik-liguni. Seinna settið í tí dystinum var ikki liðugt, fyrr enn ÍF hevði vunnið tað 33-31!

TB, sum í mong ár hevur staðið seg væl í fremstu røð hjá kvinnum, sær tí út til at vera væl á veg hjá monnunum eisini. Tað man ikki minst kennast hugaligt hjá teimum í Suðuroynni, har tað seinnu árini er blivið longri og longri millum liðini, ið megna at kappast við hini í fremstu røð.